UTTAN ÚR HEIMI

# Amerikonsku hermenninir vilja sleppa úr Irak

**Nógv teir flestu amerikonsku hermenninir í Irak halda, at USA skal taka seg aftur innan eitt ár**

IRAK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Næstan ein fjórðingur av teimum amerikonsku hermonnunum vilja sleppa úr Irak beinanvegin*

Síðani kríggið í Irak byrjaði, hevur George W. Bush, forseti, fleiri ferðir sagt, at teir amerikonsku hermenninir verða verandi har, so leingi tað er neyðugt.

Nú vísir ein meiningakanning, at tað halda hermenn hansara ikki. Í kanningini siga bara 23 prosent av hermonnunum, at teir hava somu hugsan sum forsetin. 29 prosent halda, at USA eigur at taka seg úr Irak beinanvegin, 22 prosent halda, at tað skal gerast um eitt hálvt ár, og 21 prosent halda, at amerikanararnir eiga at fara úr Irak innan eitt ár.

Samstundis siga heili 53 prosent av teimum spurdu hermonnunum, at USA eigur at tvífalda hermannatalið og bumbuálopini í Irak fyri at steðga uppreistrinum.

**Ikki borgarakríggj**

Teir hørðu samanbrestirnir í seinastuni ímillum shiamuslimar og sunnimuslimar í Irak hava fingið fleiri serfrøðingar at ávara um, at ófriðurin kann enda við borgarakríggi. Men tað væntar George W. Bush, forseti, ikki.

– Hasum trúgvi eg ikki. Allir partar siga seg vera til reiðar at samstarva, og vit skulu hjálpa teimum at røkka málinum, segði forsetin við sjónvarpið ABC í gjár.

Síðani ókendir menn søktu at einum shiamuslimskum halgidómi fyri einari viku síðani, hava meiri enn 300 fólk latið lív í bumbuspreingingum og øðrum atsóknum. Bara í gjár lógu meiri enn 60 fólk eftirá. Kortini segði amerikanski Irak-samskiparin, James Jeffrey, fyrrakvøldið, at teir amerikonsku og iraksku hermenninir hava tamarhald á støðuni.

# Norðmenn fáa sína Golden Gate

**Stórtingið hevur samtykt at byggja brúgv tvørtur um Hardangerfjørðin**

NOREG
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Gongst eftir ætlan, fer tað at bera til at koyra tvørtur um Hardangerfjørðin í Noregi um fimm ár. Sum er mugu fólk ferðast við ferju, skulu tey yvirum.

Stórtingið samtykti í gjár einmælt at byggja brúgv um fjørðin. Hon verður 1.380 metrar long og er mett at kosta tvær milliardir norskar krónur, og verkætlanin skal fíggjast við bummpengum. Talan er um eina heingibrúgv, ið sambært viðgerðini í tinginum verður longri, hægri og vakrari enn tann kenda Golden Gate í San Fransisco.

Aftenposten skrivar, at roknað verður við nógvari ferðslu eftir brúnni, tí hon verður bindilið ímillum teir báðar vakrastu landspartarnar í Noregi, Hardanger og Hallingdal, ið eru sera væl umtókt frítíðarpláss.

Uppskot um at byggja brúgv um Hardangerfjørðin var eisini í Stórtinginum fyri tíggju árum síðani, men tá fall tað.

# Skulu byggja aluminiumsvirki í Íslandi

**Heimsins størsta aluminiums-verksmiðja ætlar at byggja eitt virki afturat í Íslandi**

ÍSLAND
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Alcoa Inc., sum er heimsins størsta aluminiumsfelag, ætlar at byggja eina verksmiðju afturat í Íslandi.

Wall Street Journal skrivar, at verkætlanin er mett at kosta eina milliard amerikanskar dollarar, og at virkið verður ført fyri at framleiða 250.000 tons av aluminium um árið.

Alcoa vil ikki gera viðmerkingar til tíðindini í Wall Street Journal, men blaðið sigur seg vita, at umboð fyri Alcoa fara at leggja ætlanina fyri íslendsku stjórnina í dag.

## Putin væntar semju

Russiski forsetin, Vladimir Putin, hevur framvegis góðar vónir um, at tað fer at bera til at fáa semju til Iran um ta umstríddu kjarnorkuverkætlanina hjá iransku stjórnini.

Russiska stjórnin hevur skotið upp, at Russland og Iran byggja eitt kjarnorkuverk í felag, og at alt arbeiði við at ríka uran til verkið skal gerast í Russlandi. Hesum taka londini í Vesturheiminum undir við, men iranska stjórnin krevur framvegis, at uranið skal ríkast í Iran. So seint sum mánadagin segði iranski uttanríkisráðharrin, Manouchehr Mottaki, at landið vil hava somu rættindi sum onnur lond til at útvega sær kjarnorku til friðarlig endamál, og at eingin skal leggja landinum forðingar í vegin.

Kortini væntar Vladimir Putin, at Iran fer at slaka, tá saman um kemur. Á einari vitjan í Ungarn í gjár segði hann, at russiska stjórnin hevur góðar vónir um semju við Iran, og at partarnir hava gjørt framstig í samráðingunum teir seinastu dagarnar. USA og hini londini vestanfyri hava sagt, at tey eru sinnað at geva Russlandi ein møguleika at loysa stríðið um iransku kjarnorkuverkætlanina.

## Betri eftirlit við veiðitjóvum

Í Noregi hevur fiskiveiðieftirlitið roynt eina skipan, sum skal geva myndugleikunum betri eftirlit við øllum fiskiskapi. Endamálið er at avdúka ólógligan fiskiskap og at forða slíkum.

Skipanin ber í sær, at veiðidagbøkurnar hjá skipunum verða elektroniskar, og at eftirlitið kann hyggja í dagbøkurnar hvønn dag umvegis alnótina. Í dag verða dagbøkurnar bara kannaðar, tá menn hjá eftirlitinum fara umborð á skipini, og tað ger, at yvirmenninir kunnu broyta upplýsingarnar, skrivar Dagsavisen. Men við teirri nýggju skipanini fer tað ikki at bera til, skrivar blaðið.

– Tann nýggja útgerðin ger, at eftirlitsmenninir vita, hvussu nógv eitt skip hevur fiskað, longu áðrenn teir fara umborð, sigur Gunnstein Bakke hjá norska fiskiveiðieftirlitinum. Hann heldur, at tann nýggja skipanin er eitt týðandi stig í royndunum at steðga ólógliga fiskiskapinum í Barentshavinum.

## Russar keypa Montenegro

Tað er ikki óhugsandi, at Montenegro fer at taka loysing frá Serbia um stutta tíð, men í seinastuni er komið fram, at fleiri russiskir ríkmenn av tí ivasama slagnum eru í ferð við at leggja Montenegro undir seg.

Eitt nú eiga russar fleiri stór ídnaðarvirkir og fleiri gistingarhús, og nú um dagarnar visti eitt blað at siga, at russar ætla at gera íløgur fyri meiri enn tvær milliardir krónur á einari strond, sum er væl egnað sum ferðamál. Men sambært blaðnum veit eingin, hvaðani pengarnir koma, og í Montenego verður dúgliga tosað um, at russiska mafian er uppi í byggiætlanini.

Myndugleikarnir í Montenegro eru ikki serliga fegnir um, at fólk seta spurnartekin við tann stóra russiska áhugan fyri landinum, og leysatíðindi eru farin at ganga um umfatandi korrupsjón. Sambært myndugleikunum eru tað bara russar, sum hava víst áhuga í at gera íløgur har, men andstøðan vísir á, at teir ivasomu russisku pengarnir hava fingið íleggjarar í øðrum londum at venda Montenegro bakið.

## Skulu hava hít uppi á sær

Býráðið í kolombiska býnum Tulua ætlar, at allir ungdómar í býnum, sum eru eldri enn 14 ár, skulu hava minst eina hít uppi á sær. Men uppskotið fall á býráðsfundi í gjár, tí katólska kirkjan í landinum var harðliga ímóti tí, skrivar AP.

Men William Pena, sum legði uppskotið fram, ætlar sær ikki at gevast so, og nú ætlar hann at fáa eina fólkaatkvøðu í býnum um málið. Býráðslimurin sigur, at alt ov nógvar ungar gentur verða við barn, og harafturat stríðast nógv ungfólk við kynssjúkur. Teir trupulleikarnar kann hítin loysa, sigur hann.

Verður uppskotið samtykt á fólkaatkvøðu, fáa tey, sum gloyma at hava minst eina hít uppi á sær, 1.000 krónur í bót.